## Ein sjáldsom ferð

Ein 49 ára gamal maður í Vordingborg, sum er giftur íslendskari kvinnu, fekk av at vita herfyri, tá fyrrverandi maðurin hjá kvinnuni og ein sonur hansara komu úr Íslandi til Danmarkar við tí fyri eyga at buka hann av. Teir báðir løgdu á mannin, men tað eydnaðist konuni at senda boð eftir løgregluni. Teir báðir íslendsku feðgarnir vórðu tiknir og kunnu sambært Morgunblaðnum fáa upp í seks ára fongsul fyri ta heldur sjáldsomu ferðina.



## Felag ímóti kvotum

Í Íslandi eru nógvir útróðrarmenn so misnøgdir við kvotuskipanina, og á fundi um vikuskiftið samdust menn um at stovna eitt felag, sum skal virka ímóti verandi kvotuskipan og um neyðugt seta seg upp ímóti lógini, sum eftir felagsins tykki er órættvís. Hallgrímur Guðmundsson, sum er formaður í nýggja felagnum, sigur við Morgunblaðið, at okkurt má gerast fyri útróðurin, tí annars doyggja útróðrarbygdirnar út, sigur hann.

# Íslandskvøld í Klaksvík

**Í sambandi við Torravikuna verður serstakt Íslandskvøld í býráðshøllini í Klaksvík í kvøld við fyrilestri og tónleiki**

ÍSLANDSKVØLD
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Klokkan 21.00 í kvøld verður býráðshøllin í Klaksvík karmur um eitt serligt íslandskvøld, har Bjørn Torsteinsson, mentanarleiðari í Kopavogi fer at greiða frá hvussu býurin verður mentur.

Eisini verður høvi at hoyra íslendskan klaver- og violintónleik á høgum støði.

### Íblástur

Klaksvík og Kópavogur eru vinarbýir, og hava býirnir báðir ofta leitað sær íblástur hvør frá øðrum.

Eitt gott høvi til tað verður í kvøld, tá Bjørn Torsteinsson millum annað fer at greiða frá, hvussu Kopavogur ídag er vorðin kendur vegna tónlistaskúla, náttúrusavn, bókasavn og listasavn, innilokaðan fótbóltsvøll, tvær stórar svimjihallir, fleiri nýggjar skúlar og nú ætlar at byggja eina operu fyri 200 mió.kr.

Í Kópavogi búgva umleið 28.000 fólk. Fólkatalið er seinnu nógvu árini økt við umleið 1800 fólkum um árið. Samstundis er tað júst í hesum býi, at Jákup á Dul hevur stóra handilsvirksemi sítt. Hann hevur eitt handilsøki á 30.000 m2 og byggir nú sokallaða Føroyatornið í 22 hæddum.

### Tónleikur

Umframt fyrilesturin hjá Bjørn Torsteinsson verður høvi at hoyra íslendingarnar Páll Palomares og Hákon Bjarnason spæla violin og klaver.

Violinleikarin Páll Palomeras hevur verið konsertmeistari í Ungfonia, strúkiorkestur Tónlistarskóla Kópavogs og Symfoniorkestur Tónlistarskúla og var við í Orkester Norden á sumri 2004. Síðani 2006 hevur hann verið freelance hjá Symfoniuhljómsveit Íslands.

Hákon Bjarnason var ein av fýra teimum bestu næmingunum í í solistakapping sum Listaháskúli Íslands og Symfoniorkestur Íslands skipaði fyri í fjør. Eisini hevur hann tvær ferðir vunnið 1. virðisløn í klaverkappingini hjá islandsdeild EPTE.

Íslandskvøldið í býráðshøllini í Klaksvík er alment.



*Í býráðshøllini í Klaksvík verður í kvøld høvi at hoyra Bjørn Torsteinsson, mentanarleiðara í Kópavogi greiða frá, hvussu býurin varð mentur*





*Íslendskir tónleikaúrmælingar fara at seta dám á islandskvøldið í býráðshøllini í Klaksvík í kvøld*

# »Eingin kann gera tað perfekta« vístur í Havn

**Nýggi filmurin hjá Katrini Ottarsdóttur »Eingin kann gera tað perfekta« um myndahøggaran Hans Paula Olsen verður nú sýndur í Havn**

FRUMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Mánakvøldið 25. februar kl. 20.00 verður føroysk frumsýning av nýggja filminum »Eingin kann gera tað perfekta« í sjónleikarahúsinum í Havn.

### Hitt høvuðspersónarnar

Hetta kvøldið verða bæði leikstjórin, Katrin Ottarsdóttir, og myndahøggarin, Hans Pauli Olsen til staðar.

Aftaná sýningina verður høvi hjá áskoðararnum at hitta tey bæði og skifta orð við tey um filmin.

Filmurin hevði eina væleydnaða, útselda frumsýning á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn 30. januar og hevur síðani verið sýndur tvær ferðir í Føroyahúsinum. Fyrst í marts mánaða skal hann væntandi sýnast í Politikens Hus við Ráðhúsplássið í Keypmannahavn í sambandi við framsýning, sum Hans Pauli Olsen skal hava har.

### Góð ummæli

„Eingin kann gera tað perfekta" hevur fingið rættiliga góð ummæli í Danmark, eitt nú í Politiken, har ummælarin Dorte Hygum Sørensen gevur filminum fýra av seks stjørnum og millum annað sigur:

"Uopstyltet og konkret fortæller Hans Pauli Olsen om sit arbejde (...) Fra han begynder at tegne skulpturen op på papir, til den står færdig på Charlottenborg, har Ottarsdóttirs fotografering smukt fat i materialernes forskellige stoflighed og Hans Pauli Olsens arbejde med dem."

Frumsýningin í Sjónleikarahúsinum er almenn.

Atgongumerki kunnu bíleggjast á tlf. 321131 og 281131 ella keypast í Sjónleikarahúsinum ein tíma undan sýningini.



*Nýggi filmurin hjá Katrin Ottarsdóttir um myndahøggaran, Hans Paula Olsen, verður sýndur í Sjónleikarahúsinum mánakvøldið*